

# Saab 9-3 Sport Sedan við kvikum dieselmotori

*Nýggi 9-3 Sport Sedan fæst einans sum sedan við 4 hurðum, seinni kemur hann sum stationcar og sum cabriolet. Hesin er ein 2,2 TiD við 125 hk v. turbo og intercoolara*

**Nýggi Saab 9-3 er størsta kollvelting í søguni hjá Saab. Hóast bilurin hevur sama plattform sum Opel Vectra, hevur hann tó varðveitt alt tað sum eyðkennir ein Saab. Nú fæst bilurin eisini við einum sera kvikum 2,2 litur dieselmotori við 125 hk**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Saab 9-3 Sport Sedan kom á marknaðin í fjør. Talan er um ein helt nýggjan bil, ið er bygdur yvir sama plattform sum nýggi Opel Vectra.

Hesin nýggi 9-3 Sport Sedan fæst einans sum sedan við 4 hurðum, seinni kemur hann sum stationcar og sum cabriolet. Bæði hvat aktivu og passivu trygdini livir 9-3 Sport Sedan upp til tað sum vit kunnu vænta av einum Saab í 2003.

Umframt ABS bremsuskipan og elektroniska deiling av bremsukraftini (EBD) hevur bilurin eisini Traction Control System (TCS), elektroniskan stabilisator (ESP), mekaniskan bremsuassistent (MBA) og (CBC) ið ger at til ber at bremsa og stýra samstundis, uttan at bilurin glíður út til síðuna. Nógvar ymiskar trygdarskipanir, ið eru innbygdar í bilin, verja bilføraran og tey ferðandi sum t.d. Saab Aktive Head Restraint (SAHR) nakkapúturnar sum verja væl móti skaða á hálsin og nakkan. Saab 9-3 Sport Sedan fæst við besinmotorum frá 150 til 210 hk og einum 2,2 litur TiD (Turbo Injektion Diesel) við 125 hk. Talan er um ein sera kvikan dieselmotor, ið larmar lítið og er eins og ein bensinmotorur at koyra við.

## Saab 9-3 Sport Sedan 2,2 TiD

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,2 litur 4 syl. TiD við 125 hk v. turbo og intercoolara |
| 0-100 km/t | 10,8 sek |
| Oljunýtsla | 15,4 km/l |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 463,5 cm |
| Breidd | 176,2 cm |
| Hædd | 146,6 cm |
| Eginvekt | 1425 kg |
| Viðførisrúm | 425 litrar |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v. Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.bilarge.fo |








*Páll Danielsen, sølurmaður hjá P/F Meinhardt Arge við nýggja Nissan Micra*

# Nissan Micra - størri og rúmligari

**Navnið Nissan Micra er tað einasta nýggi Micra hevur til felags við forgangaran. Við nýggju »Keyless Go« skipanini kann bilførarin læsa seg inn í bilin starta motorin og koyra avstað uttan at taka billykilin úr lummanum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nýggi Nissan Micra er ein rúmligari bilur enn forgangarin, hann er bæði hægri og breiðari. Baksetrið kann flytast 20 cm aftur og fram, soleiðis at setrið kann koyrast aftur fyri at fáa meira beinpláss og fram fyri at fáa størri viðførisrúm. Plássið í viðførisrúminum kann broytast frá 251 til 371 litrar. Micra hevur nýggju "Keyless Go" skipanina, har bilførarin kann læsa seg inn í bilin starta motorin og koyra avstað uttan at taka billykilin úr lummanum. Micra fæst við tveimum 1,2 litur bensinmotorum við ávikavist 65 og 80 hk og einum 1,4 litur bensinmotori við 88 hk. 1,5 litur dieselmotorurin hevur 65 hk. Standardútgerðin er m.a. ABS bremsuskipan við EBD (Elektroniskum Bremsukraft Deilara) og NBA (Nissan Brake Assist), elektroniska ferð-reguleraðaservostýring, airbag framman, í síðunum og airbag gardinur í loftinum, aktivar nakkapútur, Anti-dyk forsetur og »Kom gott heim« forlyktir, sum lýsa eina løtu eftir at bilførarin hevur sett bilin frá sær. Designið er sermerkt, serliga framman, við lyktunum oman á skermunum.

Prísirnir byrja við 129.000 krónum. Bilurin verður framleiddur í Nissan bilverksmiðjuni í Sunderland í Onglandi.



*Nissan Micra innan*

